# H. M. Stanley død

*Í seinasta blaði høvdu vit eina frásøgn úr Tingakrossi í 1905 úr Congo. Í 1904 doyr Henry Morton Stanley. Verður hugt í eitt leksikon, sum er 20-30 ára gamalt, verður Stanley lýstur sum ein stórur "upp-dagilsisreisandi", sum fyrst fann tann horvna Livingstone, og sum seinni fekk kortlagt Congo.*

*Men longu í 1904 kundi Tinga-krossur lýsa Stanley sum hann veruliga var, nevniliga sum ein samvitskuleysur handlangari hjá Leopold kongi, og sum drap fyri hond, tá nakar kom fyri hansara veg. Tað er eisini ein partur av okkara Congosøgu at endurgeva eftirmælið hjá Tingakrossi av Stanley. Hetta samsvarar við ta lýsing, sum nútíðar søguskrivarar geva av honum.*

Den berømte Afrikarejsende Sir Henry Stanley er d. 10. afgaaet ved Døden. Stanley blev 63 Aar gammel. Ved hans Rejser og og Rejsebeskrivelser blev han Navn et af Verdens mest kendte, men siden han i 1895 blev valgt som Parlamentsmedlem efter en meget hidsig Valgkamp, har der været stille om hans Navn, indtil hans Død nu atter bringer det i erindring.



*Henry Morton Stanley i "Stanleyhatti", sum hann hevði gjørt til ferðing í tropunum. Longu í 1904 vísti Tingakrossur á, at hann var eitt bølmenni*

Stanley var et engelsk Fattighusbarn og allerede som Dreng kom han til Amerika, hvor det efter mange omskiftelser, Nød og Savn lykkedes ham at blive Journalist og at vinde sig et Navn som Bladkorrespondent.

I 1871 var der almindelig Uro over den berømte Afrikarejsende David Livingstones Skæbne. I lange Tider havde man ikke hørt noget fra ham. Stanley var da New York Herald Korrespondent, og Udgiveren sendte ham da ud for at finde Livingstone.

Han fandt Livingstone den 10. november 1872 langt inde i Afrika og sendte et Telegram om sit møde med ham til sit Blad, saa snart han naaede en Telegrafstation. Dermed var Stanleys Berømmelse fastslaaet. I de følgende Aar foretog han flere Rejser til Afrika. Paa hans anden Rejse 1874-77, opdagede han og kortlagde Kongoflodens Løb.

Hans Beretning om denne Rejse vakte den belgiske Konges Opmærksomhed. Han kaldte Stanley til sig og stillede ham i Spidsen for en ny Ekspedition, der skulde grunde en belgisk Koloni ved Kongofloden.

I Aarene 1879-84 opholdt Stanley sig nu i Afrika og lagde Grunden til den usalige Kongo-stat, hvor Evropæerne i hensyns-løs Rovgridskhed og Penge-begærlighed kappes om at gøre Helvede hedt for de stakkels Negre.

I Aarene 1888-90 foretog Stanley endelig sin fjerde og sidste Rejse for at undsætte Emin Pascha (ein týskur ævintýrari) som havde dannet en stor Koloni i Sudan, men



*Hetta er ein tekning út bók hjá Henry Stanley, har hann sjálvur greiðir frá sínum viðferð av teimum innføddu*

som havde sin Nød med at forsvare sig mod den saakaldte Mahdi (ein muslimsk rørsla). Hvorledes forholdene mellem Stanley og Emin har udviklet sig, er aldrig rigtigt opklaret, men det synes, som om Stanley nærmest har bortført Emin og derved overgivet hans Provins i Mahdiens Vold.

### Hærgning og Ødelæggelse

Stanley har da ikke gjort Civilisa-tionen nogen Tjeneste ved sine to sidste Rejser. Han var i det hele taget en haardhændet Mand. Han brød sig energisk og uden Skrupler sine Veje. Alt, hvad der ikke vilde vige, maatte slaas ned.

Han blev en rig Mand, han blev adlet og blev Parlamentsmedlem, men han havde mange Fjender og der var ikke uden Grund.

# Føroyar koma uppí part í norrønu Congosøguni

Henda frásøgnin um virksemið hjá Daniel J. Danielsen um hansara virksemi í og fyri fólkið í Congo hevur havt eina áhugaverda avleiðing.

Sum tað longu hevur verið greitt frá, vóru norðurlendingar í túsundtali í Congo aftaná, at Leopold kongur hevði fingið valdið í 1885. Nógvir vóru sjó-menn, sum sigldu eftir Congo-ánni. Aðrir vóru starvsmenn á landi, eisini í illa umtókta heri-num Force Publique, og so var eisini heilt fitt av trúboðarum.

Alt hetta hevur áhuga fyri søgu-skrivingina í norðanlondum, og tað er eisini nokk so fitt skrivað.

Fyri at varpa meira ljós á hesa søgu hava norrønu fornminnis-søvnini skipað fyri eini ferðafram-sýning, sum uppá skift hevur verið í Danmark, Noregi, Svøríki og Finlandi.

Tá framsýningin var í Danmark varð roynt at kanna, um Føroyar kundu geva nakað íkast. Teir fngu at vita tað, sum tá hevði verið uppá prent um Daniel, men hetta var mett at vera ov lítið til, at hetta kundi Føroyum nakran serligan leiklut í hesi søgu.

Men hetta er broytt við hesi greinarøð, sum er gjørd við hjálp frá norrønum Congoserfrøðingum. Teir eru ovfarnir um alt tað, sum nú er komið fram, og nú verða Føroyar mettar sum sjálvstøðugur partur í hesi søgu.

Arbeitt verður nú við at lata hesa framsýning fara longur í heim, nevniliga til tey pláss, sum hon viðvíkir, og er hetta fyrst og fremst Congo, Belgia og Frankaríki. Søkt verður um stuðul til hetta tiltak, og nú eru Føroyar bjóðaðar at vera við.

Hetta kemur samstundis at merkja, at Føroyar fáa eisini pláss á framsýningini við tí leikluti, sum Daniel hevði, og kemur hann tí nú at fáa ta viðurkenning, sum hann eigur.

Gongst eftir ætlan verður framsýningin í Europa í 2009 og 2010, og í 2010 er ætlanin, at hon skal koma til Congo. So sigast kann, at aftaná 107 ár fer Daniel J. Danielsen at koma "heim" aftur til Congo! Tað sum hann royndi til fánýtis í 1904.




*Hetta er lýsingin av ferðandi Congoframsýningini í Svøríki. Her vóru Føroyar ikki umboðaðar. Men nú er ætlanin at framsýningin eisini skal til Congo. Men nú hava vit okkara egnu Congosøgu og koma at vera javnbjóðis partur við tey stóru norðanlondini í komandi framsýningini*

Sosialurin